# Markleysir útbúgvingarmøguleikar.



Heimurin stendur opin fyri tær, tá tú velur útbúgvingarleið. Felags ríkisborgararætturin gevur føroyingum fría atgongd til at útbúgva seg í Danmark og í øðrum londum við fullum rætti til danskan útbúgvingarstuðul.

Saman við føroysku ÚSUN skipanini tryggjar hetta samstarv, at øll hava sama møguleika at nema sær útbúgving uttan mun til fíggjarligan førleika og uttan mun til, hvar í heiminum útbúgvingin verður tikin.

Hjá føroyingum fara útbúgvingarmøguleikarnir í heimlandinum altíð at vera avmarkaðir, og tí er neyðugt at vit samstarva á hesum øki.

Við Sambandsflokkinum eru markleysu útbúgvingarmøguleikarnir tryggjaðir. Vit ætla eisini at menna hesar møguleikar við at útvega 15 føroyskum ungdómum størv á sendistovum ríkisins úti í heimi.

**Sambandsflokkurin**
samstarv er vegurin fram

B